# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*– Um tú ikki fyrireikar teg væl, so kanst tú enda í slíkari støðu sum leygardagin, har vit fingu buksirnar togaðar niður frammanfyri 50.000 áskoðarum.*

*Claus Bech Jørgensen, sum nú er fyrrverandi landsliðsspælari*

## Landsliðið er ein fiasko

**Fyrrverandi profilar á landsliðnum halda lítið um avrikini hjá landsliðnum og mæla til venjaraskifti**

Fyrrverandi landsliðsspælararnir Allan Mørkøre og Jan Allan Müller mæla til, at nýggjur venjari verður funnin til a-landsliðið, nú liðið hevur tapt tveir dystir á rað 6-0.

– Eg segði tað, áðrenn hann tók við, og eg haldi, at nú hava øll sæð tað í verki. Jógvan Martin hevur ov lítla respekt millum leikarnar. Einki gott kemur burtur úr einum 6-0 tapi, og um nøkur krøv verða sett til landsliðsvenjaran, so eigur hann at fara frá nú, sigur Allan Mørkøre, sum hevur spælt 54 landsdystir fyri Føroyar, við Norðlýsið. Hann heldur, at landsliðið í løtuni er ein fiasko.

– Sjálvur spæli eg eisini í næst bestu deildini, men tað er eingin ivi um, at eg hevði staði meg nógv betur enn fleiri av hasum, sum als ikki eru góðir nokk til at bera føroyska landsliðsbúnan. Eg eri sera skuffaður, tí hetta ger, at áhugin og respektin kring føroyskan fótbólt er fallandi, og hetta kann ikki sleppa at halda fram, sigur Allan Mørkøre.

Jan Allan Müller, sum spældi 34 ferðir á landsliðnum, heldur, at skeivur venjari varð settur, tá Henrik Larsen gavst.

– Jógvan Martin kann ikki lastast fyri úrslitini. Hetta er meir ein skeiv avgerð og setan av leiðsluni í FSF. Teir hava ikki verið heilt greiðir yvir, at tað er tørvur á einum profili sum venjara. Um Jógvan skal steðga sum landsliðsvenjari, skal eg ikki døma um. Eg eri ikki nóg væl vitandi um støðuna, sum hon er. Men eg má siga, at tað er ikki rætt at seta ein fyrrverandi hjálparvenjara til høvðusvenjara, og har burdi leiðslan í FSF vita betur, sigur Jan Allan Muller við Norðlýsið.

Hann heldur, at Todi Jónsson kundi verið eitt gott boð upp á nýggjan landsliðsvenjara.



*– Eg havi spurt, hví eg ikki sleppi at spæla, men eg havi fingið eina frágreiðing, sum eg als ikki skilji ella vil taka undir við. Eg eri sera keddur av hesari støðuni, men nú er einki annað at gera uttan at gevast, sigur Claus Bech Jørgensen.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Claus gevst á landsliðnum

**– Eg havi mist gleðina at spæla á landsliðnum, sigur Claus Bech Jørgensen, sum var avsettur til dystin ímóti Skotlandi og ongantíð kom á vøllin. Hann heldur, at fyrireikingarnar hjá landsliðnum til dystir eru ikki nóg góðar, og tað hevur hann gjørt vart við**

LANDSLIÐIÐ
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Claus Bech Jørgensen takkar í dag fyri seg á føroyska fótbóltslandsliðnum.

Miðvallarspælarin, sum í sjey ár hevur verið yrkisspælari í Onglandi, hevur mist hugin at spæla á landsliðnum, og tí hevur hann í morgun boðað frá, at hann gevst á landsliðnum.

– Soleiðis sum forholdið millum meg og landsliðsvenjaran er blivið, er tað best, at eg haldi meg burtur, sigur Claus Bech Jørgensen.

– Eg hevði ikki droymt um, at eg skuldi fara at siga nei til at spæla á einum landsliði, men eftir at hava hugsað meg væl um, eri eg sannførdur um, at hetta er rætta avgerðin. Eg havi mist gleðina at spæla á landsliðnum, sigur hann.

### Avsettur

Claus Bech Jørgensen, sum seinastu sjey árini hevur spælt yrkisfótbólt í Onglandi, hevur spælt 10 landsdystir fyri Føroyar. Hann hevur mammu úr Føroyum, og síðani hann kom á landsliðið í 2004, hevur hann verið roknaður sum ein av føstu spælarunum.

Í dystinum ímóti Georgia á Svangaskarði fyri sløkum trimum vikum síðani, varð hann skiftur út í hálvleikinum, og hann var als ikki á vøllinum, tá ið Føroyar spældu ímóti Skotlandi leygardagin.

– Eg havi spurt, hví eg ikki sleppi at spæla, men eg havi fingið eina frágreiðing, sum eg als ikki skilji ella vil taka undir við. Eg eri sera keddur av hesari støðuni, men nú er einki annað at gera uttan at gevast, sigur Claus.

### Ikki nóg góðar fyrireikingar

Claus Bech Jørgensen heldur, at fyrireikingarnar hjá føroyska landsliðnum til landsdystir eru ikki nóg góðar.

– Tað er nógv viðurskifti, sum kundu verið betri í fyrireikingunum. Eg havi eisini roynt at gjørt vart við hetta, men eg havi bara møtt mótstøðu. Eg havi spælt í Onglandi í nógv ár, og eg havi upplivað, hvussu dugnaligir venjarar fyrireika síni lið til dystir, og har hevur føroyska landsliðið nógv at læra.

– Hetta er ikki bara grenj, tí eg vil føroyska landsliðnum alt tað besta, men eg vóni, at liðið fær venjarar og leiðarar, sum hava royndir frá yrkisfótbólti, og sum kunnu fyrireika liðið betur til dystirnar. Um tú ikki fyrireikar teg væl, so kanst tú enda í slíkari støðu sum leygardagin, har vit fingu buksirnar togaðar niður frammanfyri 50.000 áskoðarum, sigur Claus Bech Jørgensen.